Fróðskaparsetur Føroya

19. februar 2004

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 2/2004

Tíð: Hósdagin 12. februar 2004 kl. 13.00-16.00

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Malan Marnersdóttir, rektari
Jóan Pauli Joensen, vararektari, megindeildarráðsf. fyri Søgu- og Samfelagsdeildina
Turið Sigurðardóttir, megindeildarráðsf. fyri Føroyamálsdeildina
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri Náttúruvísindadeildina
Annika Sølvará, setursskrivari
Ruth Johansen, frá Setursskrivstovuni

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 1/2004 setursráðsfundi 22. januar 2004.**
Frágreiðingin góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
Skráin góðkend. HPJ var misnøgdur við, at mál ikki kunnu koma á ískoytisskrá til "millumfundir", sum hesin fundurin var.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fyrisitingin á Fróðskaparsetrinum:**

a. **Framløga Annika Sølvará, setursskrivari.**
AS legði fram verkætlan "Fyrisitingin á vegamóti. Leikluturin og uppgávurnar hjá fyrisitingini á Fróðskaparsetrinum nú og um eitt ár". Hetta er ein verkætlan, sum varð sett í gongd á heysti 2003 til tess at skipa arbeiðið á Setursskrivstovuni optimalt í mun til settu karmarnar, og sum er partur av leiðaraútbúgving hjá AS. Starvsfólkini á SSS hava leypandi verið við í arbeiðinum, og rektarin hevur javnan verið kunnaður um gongdina í málinum. Útgangsstøðið var m.a., at tørvur er á at meta um javnvágina millum uppgávurnar og tøka tilfeingið. Ætlanin við verkætlanini er m.a. at skipa arbeiðið enn betur og at definera og sjónliggera leiklutin hjá SSS í samlaða stovnsbygnaðinum.
Gjørd er ein samanbering millum árini 1998-2003 viðvíkjandi starvsfólkabroytingum, virksemisøking á Fróðskaparsetrinum og broytingum á skrivstovuni, sum vísir øktu arbeiðsbyrðuna, samstundis sum starvsfólkatalið einans er økt við ¼ starvi. Greitt varð frá støðuni nú, m.a. at lógar- og regluverk ikki er nøktandi og ivi er um mørk á ymsum ábyrgdarøkjum.

| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

Framtíðarmyndin er m.a., at vit fáa betri tilrættislegging, greiðu um tilfeingisnýtslu og greiðu um bygnaðin. Greitt varð frá arbeiðsætlan, sum byrjaði í september 2003 og er ætlað at enda í desember 2004. Í løtuni verður gjørd ein neyv ársætlan fyri allar uppgávur og meting av tíðarnýtslu hjá hvørjum einstøkum starvsfólki til hvørja uppgávur. Aftaná skulu uppgávurnar bólkast og raðfestast, umleggjast um tað verður mett neyðugt. Annar partur av verkætlanini er at gera skrivligar mannagongdir fyri øki, sum ikki eru lýst nóg væl. Innan- og uttanhýsis kunning um fyrisitingina og uppgávurnar er eisini partur av arbeiðinum.
Til seinast varð lagt ynski fram fyri leiðsluna, at fyrisitingin verður raðfest hægri, m.a. at játtan til fyrisiting økist, tá virksemið økist, og at leiðslan stuðlar menningini, m.a. at avsett verður tíð til at tosa um fyrisiting, samanhang millum settar karmar, ynskir og krøv.

b. **Orðaskifti.**
Spurt og svarað varð so hvørt undir framløguni, og aftaná var orðaskifti. Sum heild var setursráðið stak væl nøgt við at fáa so greiða og væl skipaða kunning um fyrisitingina. Ráðið stuðlar av fullum huga verkætlanina og ætlanina við henni at skipa arbeiðið enn betur enn tað longu er.

M.a. vóru hesir spurningar umrøddir undir orðaskiftinum:
- Uppgávubýtið millum megindeildarskrivstovurnar og setursskrivstovuna
- Ábyrgdarbýtið millum setursleiðslu og fyrisiting
- Arbeiðsgongdir í sambandi við bókhald
- Møguligt dupultarbeiði

AS legði dent á, at tað er ikki ein spurningur um at seta fleiri fólk á Setursskrivstovuni nú, men at endamálið er at fáa klárlagt, hvussu javnvágin er millum uppgávur og tilfeingið. Leiðslan kann síðani taka støðu til, um til ber at loysa uppgávurnar við verandi tilfeingi ella um uppgávur mugu minkast/tilfeingið økjast. Fyrisitingin er so sperd nú, at tað kunnu ikki takast fleiri uppgávur inn, uttan at meir arbeiðsorka fylgir við.

MM tók samanum:
1. Tað er neyðugt at fáa betri greiðu á arbeiðsbýtinum millum leiðslu og fyrisiting.
2. Leiðslan má javnan viðgera karmarnar fyri fyrisitingararbeiðið og taka fyrilit fyri fyrisitingarligum avleiðingum av samtyktum ráðsins.
3. Setursskrivarin hevur fullan moralskan stuðul frá setursráðnum til at halda fram at greina og endurskoða skipanina í fyrisitingini.

Avgjørt varð, at ein framløgufundur verður millum deildarskrivstovurnar, setursskrivstovuna og setursráðið, har hugt verður at, um nakað eigur at skipast øðrvísi.

4. **Ymist:**
   a. MM boðaði frá, at ætlanin er at bjóða nýggja landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni á vitjan á Fróðskaparsetrinum.
   b. MM boðaði eisini frá gávuhandan úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum tann 13. februar, har setursráðslimir eru vælkomnir. (J.nr. 0073-01288).

Frágreiðing: Ruth Johansen og Annika Sølvará